# Vil hava umsitingina av Smyrli flutta til Suðuroyar



*Hergeir Nielsen vil nú hava at vita, hvat Landsstýrið sigur til at flyta umsitingina av Smyrli av Strandferðsluni í Havn, til Suðuroyar, har hon er nærri borgarunum. Seinni heldur hann, at øll Strandferðslan skal flyta suður*

**– Og tá ið Norðoyatunnilin er komin, heldur Hergeir Nielsen, at tað er sjálvsagt, at restin av umsitingini hjá Strandferðsluni, fylgir við**

ALMENN UMSITING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

**Suðuroy:** Hergeir Nielsen, løgtingsmaðir, vil nú hava landsstýrið at kanna, um nakrir fyrimunir høvdu verið við at flutt umsitingina av Smyrli av Strandferðsluni í Havn, til Suðuroyar.

Ì løgtinginum fer hann nú at spyrja Bjarna Djurholm. landsstýrismann í samferðslumálum, um hann sær nakrar verkligar og fíggjarligar fyrimunir í at flyta umsitingina av Smyrli nærri brúkarunum í Suðuroynni?

Hann spyr eisini landsstýrismannin, hvussu nógv starvsfólk eru knýtt at Smyrli, bæði á sjógvi og á landi og hann vil eisini hava at vita, hvussu stórur partur av samlaðu lønarútreiðslunum hjá Strandferðsluni, fara til at umsita Smyril, bæði á sjógvi og á landi.

Hann vísir á, at umframt at verða størsta ferðamannaskipið hjá Strandferðsluni, er hann eisini lívæðrin hjá suðuroyingum á samferðsluøkinum.

Hann minnir eisini á, at í 1996 varð annað suðuroyarskipið, Teistin, selt, uttan orð ella tal, sum hann tekur til.

– Eftir tað lá suðuroyarleiðin í svartasta vónloysi til farið varð undir at dagføra hana, so skjótt sum samgongan tók við í 1998.

Hann sigur, at fleiri ábøtur eru framdar, eitt nú við at túratalið er hækkað upp í tvær ferðir um dagin hvønn dag í vikuni.

Og tá ið nýggi Smyril kemur, verður tað enn eitt stórt framstig.

### Er vaksið 44% upp á fimm ár

Hergeir Nielsen sigur, at Roknskapurin hjá Strandferðsluni vísir, at lønarútreiðslurnar eru vaksnar heili 44% tey fimm árini, Bjarni Djurholm hevur umsitið stovnin.

Hesi seinastu árini hava lønarútreiðslurnar hjá Strandferðsluni verið hesar:

1998: 50 mió.kr.
1999: 54 mió.kr.
2000: 62 mió.kr.
2001: 69 mió.kr.
2002: 72 mió.kr.

Løgtingsmaðurin sigur, at eftir fíggjarlógini at døma, eru 180 fulltíðarstørv á Strandferðsluni. Og tá ið tey forvinna tilsamans 72 milliónir um árið, er tað sostatt talan um eina løn upp á 400.000 krónur í meðal fyri hvørt fulltíðarstarv.

Hann sigur, at harafturat vísir roknskapurin, at sjálvur Smyril kostar 16,1 milliónir krónur í lønum um árið

– Hetta svarar til áleið 40 starvsfólk við eini ársløn upp á 400.000 krónur í meðal, ella til 50 starvsfólk við eini ársløn upp á 320.000 kr. í meðal.

Hinvegin kostar felags fyrisitingin á landi, sum eisini umsitur Smyril, 24,3 milliónir krónur. Av teimum fara 13 milliónir til lønir.

Hergeir Nielsen minnir eisini á, at tað stendur í samgonguskjalinum, at "miðað verður eftir, at møguligir nýggir almennir stovnar verða lagdir kring landið".

Samstundis er gjørt av, at nýggi Smyril verður skrásettur í Trongisvági.

Hann sigur, at sostatt er tað almenni hugburðurin, at almenn starvsfólk skulu flytast út í útjaðaran, saman við nýggja Smyrli.

Og tí spyr hann Bjarna Djurholm um vilji er til at flyta eitt munandi tal av almennum størvum til Suðuroyar at umsita nýggja Smyril, har hann verður skrásettur.

Hergeir Nielsen vísir eisini á, at nú er siglingin um Vestmannasund inn á Skálafjørðin, hildin uppat.

Tá ið koyrandi verður undir Lorvíksfirði, heldur eisini tann siglingin uppat.

– Tá er tað ikki annað enn rímiligt, at umsitingin hjá Strandferðsluni, ið tá verður eftir, verður løgd saman við umsitingini í Suðuroy, sigur Hergeir Nielsen.

# Porkerningar spyrjast um teir vilja hava seyðin úr bygdini um veturin

**Bygdarráðið í Porkeri hevur umrøtt møguleikan at fáa seyðin úr bygdum øki um veturin, men onki verður gjørt, fyrrenn bygdarfólkið hevur sagt sína hugsan**

FRIÐUR FYRI SEYÐI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Bygdaráðið í Porkeri fer nú at spyrja allar porkenningar, sum eru yvir 18 ár, og hava vælrætt, um teir taka undir við, at bygdin verður heilt, ella partvís friðað fyri seyð um veturin*

**Porkeri:** Tað eu nógv, sum illneitast inn á allan seyðin, sum gongur og melur um geilar og tún allan veturin.

Hinvegin hevur seyðurin rætt til vetrarbit oman í mølina og tey eru eisini mong, sum tvíhalda um rættin til hetta vetrarbitið.

Í Porkeri skal hesin spurningurin nú standa sína roynd.

Á bygdaráðsfundi í Porkeri mánakvøldið, umrøddi bygdaráðið møguleikan f yri at friða bygdina, heilt ella partvís, fyri seyði um veturin.

Men ásannandi, at hetta er eitt sera eymt mál, sum nógv ganga høgt uppí, gjørdi bygdaráðið eisini av, at onki verður gjørt, fyrrenn bygdarfólkið hevði fingið høvi til at siga sína hugsan.

Tí skulu allir porkerningar, sum eru yvir 18 ár og sostatt hava vælrætt, vænta sær bræv frá kommununi fyrsta dagin.

Í brævinum er eitt spurnarblað, har teir verða spurdur, um teir taka undir við, at bygt øki í Porkeri verður friða fyri seyð um veturin, ella um teir eru ímóti tí.

Atkvøðugreiðslan er loynilig og atkvøðuseðlarnir skulu verða bygdaráðnum aftur í hendi í seinasta lagi á nýggjárinum, 31. desember.

### Nógvir møguleikar

Í Porkeri verður ógvuliga nógv gjørt burturúr seyðahaldi og tí ásannaði bygdaráðið eisini, at hetta verður ein trupul spurningur at greiða.

Tí staðfesti bygdaráðið, at talan er bara um eina vegleiðandi kanning, sum bygdaráðið kann hella seg til í eini víðari viðgerð.

Somuleiðis gjørdi bygdaráðið sær eisini greitt, at vísir kanningin, at porkerningar ikki taka undir við at friða bygt øki fyri seyð um veturin, verður heldur onki gjørt.

Her hinvegin meiriluti fyri tí, skal málið takast upp aftur á borgarafundi, har tosast skal um, hvussu málið kann loysast og um, hvussu umfatandi friðingin skal vera.

Møguleikin er at friðingin skal umfata allan bøin. Ein annar møguleiki er, at tað bara verður friðað rundanum húsini, so at seyðurin bara verður beindur burtur av vegnum og burturúr úr túnum og urtagørðum. Ella kann talan verða um eina loysn mitt ímillum.

Á bygdaráðsfundinum var nógv tosað um, hvørjar avleiðingar, ein friðing, sum er ov víttfevnd, kann fáa. Víst varð á, at summi hava seyð- og hoyggjhús við húsini og tey máttu ikki verða forðað í at brúka tey. Eisini varð víst á, at verður friðingin ov víttfevnt, merkir tað eisini, at fólk kunnu ikki brúka sín egna bø til seyð um veturin.

Hinvegin varð eisini víst á, at tað var ikki serliga heppið, at so nógvur seyður gongur og melur á vegnum allan veturin.



# Vinnulig atlit góðtikin

**Løgtingið viðgongur nú, at PBS-málið eisini snýr seg um vinnupolitisk atlit. Samgongan heldur tað vera í lagi, tí tað hevur løgtingið samtykt frammanundan. Enn eitt kapitull varð skrivað í PBS-málinum, tá Sambandsflokkurin royndi at broyta lógina, men uppskotið fekk kalda móttøku**

PBS-MÁLIÐ
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*Tríggir høvuðsaktørar í PBS-málinum millum landsstýrið og peningastovnarnar. Bankastjórin, landsstýrismaðurin og andstøðingurin*
*Myndakollaga: Álvur Haraldsen*

Einki bendir á, at Sambandsflokkurin fær undirtøku fyri at broyta lógina um persónsupplýsingar til frama fyri peningastovnarnar. Tað vísti orðaskiftið í tinginum týsdagin. Skal uppskotið fáa meiriluta, skal øll samgongan og minst ein samgongulimur taka undir við uppskotinum, men tað bendir einki á fer at henda.

Málið hevur stungið seg upp, tí Elektron og peningastovnarnir vilja fremja sjálvvirkandi flytingar millum fólk og stovnar í Føroyum í samstarvi við PBS í Danmark. Tað merkir, at upplýsingar skulu liggja í einari danskari skipan. Tað helt Høgni Hoydal landsstýrismaður ikki samsvara við tingsins vilja, og tí lýsti hann eina kunngerð, sum ásetir, at peningaflytingar millum fólk og stovnar í Føroyum skulu fara fram í Føroyum.

Tað vil Sambandsflokkurin broyta í lógini. Hann vil gera tað frítt hjá peningastovnunum at gera av, hvar upplýsingar teirra skulu liggja. Men uppskotið fær neyvan undirtøku eftir orðaskiftinum at døma.

### Múrar um Føroyar

Málið er farið at snúgva seg um, hvørt talan er um vernd hins einstaka ella vinnupolitisk atlit. Tingmenn viðganga nú, at tað eru vinnupolitisk atlit, sum liggja í buktini. Í øllum førum eisini.

– Eg haldi tað vera undrunarvert, at landsstýrismaðurin við lógarmálum er so snævurskygdur, tori eg at siga, at hann vil byggja ein verjugarð um hetta landið. Um ein stovn í landinum, fyri at verja nøkur arbeiðspláss. Vit liva í eini alheimsgerð, og heimurin verður minni og minni fyri hvønn dag, sum gongur. Kortini so tvíheldur mann um hendan verjugarðin. Vit skulu byggja ein múr um hetta landið, fyri at vit skulu klára okkum sjálv, sigur Bárður Nielsen, sum legði uppskotið fram fyri Sambandsflokkin.

### Vit duga og orka

Jógvan Arge, framsøgumaður Tjóðveldisfloksins, vísir hvassliga sjónarmiðunum hjá Sambandsflokkinum aftur. Hann segði uppskotið vera enn eitt av hesum, sum eru merkt av hugsanini um, at vit duga einki, kunnu einki og orka einki sjálv. Hann vísti enn einaferð, at tað var løgtingsins vilji, sum varð førdur út í lívið. Og hann staðfesti, at tað eisini vóru vinnupolitisk atlit framd, men tað var einki forgjørt í tí.

– Tað er einki dulsmál, at vinnupolitisk atlit høvdu týdning, tá reglan um, at heilar edv-skipanir ikki skuldu av landinunum, komu í lógina í 1994. Vit halda framvegis ikki, at tað er rætt at senda allar upplýsingar, sum viðvíkja føroyingum í Føroyum av landinum at verða viðgjørdar og goymdar, og vit halda eisini, at føroyingar eru førir fyri sjálvir at gera skipanir til tann tørv, sum vit hava. Í orðaskiftinum, sum hevur verið um málið, hava vit einki hoyrt um, at okkara fyritøkur ikki eru førar fyri at gera arbeiðið, sigur Jógvan Arge.

Hann staðfesti, at talan er um persónsvernd, men tað ger ikki støðuna verri, at hetta eisini tryggjar vinnuførleikan á økinum – heldur enn at lata førleikan liggja uttan fyri okkara samfelag.

### Prinsipielt skeivt

Kristian Magnusssen úr Javnaðarflokkinum hevur ført svørið fyri peningastovnarnar og Elektron í hesum málinum. Og í tinginum førdi hann somu sjónarmið fram, sum hava verið hoyrd áður. Hann heldur beinleiðis Høgna Hoydal hava brotið lógina um persónsupplýsingar við at forða peningastovnunum at flyta upplýsingar av landinum. Men hann lat kortini løgtingið skilja, at tað ikki er vist, at hann tekur undir við uppskotinum hjá Sambandsflokkinum.

– Eg haldi tað prinsipielt vera skeivt, at mann kemur í løgtingið at broyta eina lóg, bara tí at landsstýrismaðurin brýtir lógina. Tað er ein løgin mannagongd, sum vit hava sæð fyrr. Hervið sleppur mann kanska undan at siga, at landsstýrismaðurin gjørdi ein feil. Soleiðis kunnu vit kanska devaluera eina avgerð hjá rættinum. So vítt eg dugi at skilja og fleiri serfrøðingar við mær, so er Høgni Hoydal í ferð við at taka bara eitt vinnupolitiskt atlit, og tað stendur einki í lógini, sum heimilar tí, sigur Kristian Magnussen.

### Bóltar rút

Sambandsfólk bíðaðu helst spent eftir Fólkaflokkinum, tí tað var helst haðani, tey vónaðu at fáa stuðul fyri sínum uppskoti. Men einki bendir á, at Fólkaflokkurin fer við teimum.

Jógvan á Lakjuni, sum eisini er formaður í Rættarnevndini, tóktist at standa við, at tað er løgtingið, sum hevur gjørt av, at persónsupplýsingar í edv-skráum, sum koma undir lógina, skulu goymast og viðgerast í Føroyum.

– Sambandsflokkurin skýtir upp at taka tað burtur, sum løgtingið fleiri ferðir hevur samtykt. Taka tað burtur úr lógini, sum løgtingið hevur lagt afturat, bæði í 1994 og 2001. Mann fer frá einum prinsippið um, at persónuppslýingar í mestan mun skulu vera í Føroyum, til at siga, at tað blanda vit okkum slett ikki uppí. At tað skal vera púra frítt. Eg sakni nøkur argument fyri, at Sambandsflokkurin bóltar rút, tí teir hava eisini samtykt hetta. Tað var eitt einmælt løgting, sum segði, at persónsupplýsingar skulu varðveitast í Føroyum. Hetta er ógvuliga umráðandi, sigur Jógvan á Lakjuni.

### National trygd

Høgni Hoydal, landsstýrismaður, stendur rimmarfast um, at tað er í samsvari við tingsins vilja, at upplýsingar skulu goymast í Føroyum, og hann vísir aftur, at hetta forðar fyri samskifti úteftir.

– Tað stendur øllum púra frítt at samskifta við bæði PBS og øll onnur. Men tá tað snýr seg um flytingar og upplýsingar millum teg og meg í Føroyum. Millum stovnar, fyritøkur og fólk í Føroyum. Lat tað so fara fram í Føroym, sigur Høgni Hoydal.

Hann viðgongur, at tað eru vinnupolitisk atlit, ið eru arvað frá undanfarnum løgtingum, sum liggja undir lógini. Men tað snýr seg eisini um trygd. Bæði persónliga og nationala.

– Gamaní snýr tað seg um vinnupolitisk atlit. Men tað snýr seg eisini um løgræði. Um vit ikki forða hesum, so kunnu allar upplýsingar flytast av landinum, og hvør hevur so ræði á økinum. Hvør kann so tryggja verndina hjá tí einstaka. Hetta snýr seg eisini um nationala trygd og hvør hevur ræðið á økinum, sigur Høgni Hoydal.

Uppskotið hjá Sambandsflokkinum varð beint í rættarnevndina.